

*Viberg Sørensen, formaður í Føroya Reiðarafelag, heldur, at Jan Højgaard, formaður í Føroya Fiskimannafelag, dyrgir eftir eini fastlønarskipan fyri fiskimenn*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

# Føroyskir fiskimenn hava heimsins bestu sáttmálar

**- Um formaðurin í Føroya Fiskimannafelag heldur, at sáttmálarnir hjá fiskimonnum í okkara grannalondum eru so góðir, er hann vælkomin at skjóta upp, at hesir verða settir í gildi fyri føroyskar fiskimenn, sigur formaðurin í Føroya Reiðarafelag, Viberg Sørensen**

SÁTTMÁLASTRÍÐ
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Verkfall er í fiskiflotanum og øll skip, sum eru ella koma í havn, verða løgd.

Formaðurin í Føroya Reiðarafelag, Viberg Sørensen, sigur, at oljan er vorðin ein so tyngjandi partur av rakstrinum av føroyska fiskiskipaflotanum, at tað í summum førum loysir seg líka væl at lata skipini liggja við bryggju.

- Ringast fyri eru lemmatrolararnir, og hjá partrolarunum er oljan eisini ein ógvuliga tyngjandi partur.

Viberg ásannar, at dýrkaða oljan sum heild er tyngjandi fyri raksturin hjá okkara fiskiskipaflota.

- Tað er bert í fáum førum, at oljan fer av óbýttum, eitt nú hjá línuskipum og verksmiðjutrolarum.

## Olja og eftirløn

Útlitini fyri dýrkandi olju vóru júst orsøkin til, at oljan kom við í eitt sonevnt protokollat undir samráðingunum millum Føroya Reiðarafelag og Føroya Fiskimannafelag í avtaluni frá 17. januar 2005.

- At umboðini fyri Føroya Fiskimannafelag nú slett ikki vilja tosa um luttøku í oljuni, men bara halda fast um síni egnu krøv um eitt nú eftirløn, er ógvuliga hugstoytt og vísir lítlan vilja til at fáa tingini at bera til.

Formaðurin í Føroya Reiðarafelag heldur, at tað átti at sagt samráðingarfólkunum hjá Føroya Fiskimannafelag nakað, at ávísir skipabólkar eru so illa fyri við dýrkaðu oljuni, at tað loysir seg líka so væl hjá reiðaríunum at lata skipini liggja við bryggju.

- Vit vístu okkara góða vilja til loysn av sáttmálastrínum við at skjóta upp at leingja verandi sáttmála, men heldur tað vildi Føroya Fiskimannafelag ganga við til.

## Heimsins bestu

Viberg Sørensen heldur ikki, at fiskimenn sum heild eru so misnøgdir við viðurskiftini, sum Føroya Fiskimannafelag vil vera við.

- Eg havi varhugan av, at teir flestu eru rímiliga væl nøgdir – og nógvir eru mær vitandi heilt væl nøgdir.

Hann vísir á, at sáttmálarnir hjá okkara fiskimonnum munnu teljast millum heimsins bestu, men kortini liggja Føroyar millum tey lond í heiminum, sum hava flestu verkføllini.

- Um formaðurin í Føroya Fiskimannafelag heldur, at sáttmálarnir hjá fiskimonnum í okkara grannalondum eru so góðir, er hann vælkomin at skjóta upp, at hesir verða settir í gildi fyri føroyskar fiskimenn, men eg vænti, at hann fær annað at síggja.

Viberg væntar soleiðis ikki, at tað finnast sáttmálar fyri fiskimenn yvirhøvur, sum eru betri enn teir føroysku.

## Eitt modell

- Vit hava eisini skotið upp eitt modell, har sáttmálarnir fyri allan flotan verða gjørdir eins, soleiðis at oljan fer av óbýttum. Afturfyri vilja skipaeigarar kompensera við eftirløn á tann hátt, at býtisprosemið verður tillagað. Í hesum uppskoti hava vit ikki fasthildið um nøkur ávís tøl, men skotið upp, at feløgini saman tosa um ein slíkan møguleika og saman seta tøl á.

Formaðurin í Føroya Reiðarafelag heldur tað eisini vera hugstoytt, at umboðini fyri Føroya Fiskimannafelag í hesum sambandi hava tikið tey ”ringastu” tølini fram og hava vrakað eitt slíkt upplegg.

- Vit hava ikki hongt okkum í nøkur ávís tøl, men hava hinvegin skotið upp at tosa um ein slíkan møguleika.

Viberg vísir á, at hevði oljan farið av óbýttum hjá eitt nú lemmatrolarunum, hevði býtisprosentið farið munandi upp.

- Viðurskiftini høvdu verið nógv einfaldari, um tey vóru meira eins yvir allan flotan, leggur hann aftrat.

## Í sama báti

Formaðurin í Føroya Reiðarafelag sigur seg slett ikki skilja meiningina hjá formanninum í Føroya Fiskimannafelag, tá ið hesin aftur og aftur ber fram, at fiskimenn ikki skulu gjalda fyri at sleppa til arbeiðis.

- Jan Højgaard sigur, at fiskimenn skulu ikki gjalda fyri at fara til arbeiðis. Soleiðis heldur hann tað ikki vera rímiligt, at reiðarar og fiskimenn í felag bera útreiðslurnar fyri at fáa fiskin upp úr havinum og føra hann til lands.

Viberg sigur seg undrast yvir hesi úttalilsi og spyr, um tað er ein fastlønarskipan fyri fiskimenn, sum Jan Højgaard dyrgir eftir.

- Skipaeigarar og fiskimenn eru jú í sama báti og hava somu áhugamál. Tá ið eitt skip loysir, eru nakrar útreiðslur knýttar at tí at fáa hendur á fiskinum. Tað átti tí ikki at verið meira enn rímiligt, at útreiðslurnar fyrst verða drignar frá – og at man síðan býtir tað, ið eftir er.

Formaðurin í Føroya Reiðarafelag vísir á, at hin møguleikin er, at skipaeigarar bera allan kostnaðin av at fáa fatur á fiskinum og síðan eiga ágóðan av allari veiðini. Tá kunnu fiskimenn í staðin sigla undir einari fastlønarskipan.

- Er tað hetta, sum formaðurin í Føroya Fiskimannafelag vil, endurtekur Viberg Sørensen, sum ikki sigur seg skilja hugburðin hjá Jan Højgaard um, at fiskimenn ikki skulu noyðast at ”betala” fyri at fara til arbeiðis.

## Sjálvandi eftirløn

Formaðurin í Føroya Reiðarafelag sigur, at sjálvandi vilja reiðarar og skipaeigarar, at fiskimenn skulu hava góðar umstøður, og at teir eisini skulu hava eina eftirløn.

- Tað var eisini tí, at vit skutu upp modellið við at gera sáttmálarnar eins, samstundis sum vit kundu samráðst víðari um eftirløn og býtisprosent. Vit hildu uppá, at allir fiskimenn eiga at fáa somu eftirløn í krónum fyri hvønn dag á sjónum. Men Føroya Fiskimannafelag var ikki til at tosa við, og longu í byrjanini av hesum samráðingum sást skjótt, at vónirnar um eina loysn á sáttmálatrætuni vóru vánaligar, sigur Viberg Sørensen, sum einki boð hevur uppá, hvussu feløgini skulu koma víðari, soleiðis at semja kann spyrjast burtur úr.

Kravið hjá Føroya Fiskimannafelag um eftirløn var 200 krónur um dagin fyri hvønn fiskimannin. Taka vit ein vanligan línubát, merkir hetta eina eykaútreiðslu fyri reiðaríið upp á einar 700.000 krónur um árið.

- Vit vildu hava eina ”balansu” millum tað, sum vit kunnu lata – og tað, sum vit kunnu fáa innaftur. Taka vit garnaskipini, kundi ein fiskimaður fingið umleið 150 krónur um dagin í eftirløn, um oljan fór av óbýttum, sigur Viberg Sørensen, formaður í Føroya Reiðarafelag.